








*Jóannes Patursson var virkin í politiska orðaskiftinum til tað seinasta. Her er hann avmyndaður á ólavsøku í 1946*

Mynd: Meinhard Arge

Ein mánað seinni, tann 3. juli, hevur hann aftur trivið í pennin og ger vart við seg í Dagblaðnum. Nú ger hann upp, hvat fólkaatkvøðan snýr seg um. Hann vísir á, at í 1906 fingu føroyingar eisini tilboð frá donsku stjórnini um at taka ræði yvir skattum og tollum sínum, og afturfyri skuldu teir so gjalda fyri sínar telefonir, vegir og havnir. Tá varð skrivað út løgtingsval um spurningin, men nú skulu føroyingar velja á fólkaatkvøðu ímillum at fara undir Danmark ella skiljast frá Danmark.

Jóannesi Patursson hóvar illa, at danska stjórnin hevur sett viðurskiftini landanna millum upp á spíssin og staðfestir, at hon hevur bjóðað føroyingum av. Í fyrstu grein í stjórnaruppskotinum stendur, at Føroyar eins og higartil eru partur av Danmarkar ríki. Jóannes bóndi skrivar: "Henda deyðsdóm yvir Føroyar, okkara egna land, vilja teir hava føroyingar, sum nú liva, at samtykkja. Hetta, sum føroyingar aldri nakrantíð hava samtykt, síðan fedrar teirra settust her á útskerini um ár 850."

At enda mælir bóndin øllum frá at velja stjórnaruppskotið og heldur velja loysingina, tó at hetta er eitt grefligt orð. Hóast møguleikin er grefliga orðaður, merkir orðið ikki annað enn, at føroyingar skulu eiga Føroyar, sum teir hava átt tær, síðan Grímur Kamban setti fótin á landið, vísir hann á.

## Talar á ólavsøku

Jóannes Patursson heldur fram at agitera í juli mánaði. Tann 9. juli og 26. juli skrivar hann meira um fólkaatkvøðuna, og evnið er tað sama sum frammanundan. Danskarar hava bjóðað føroyingum av og vilja hava føroyingar at avreiða sítt land. Hann vísir á, at hann í 1935 segði í landstinginum, at føroyingar eru norrøn tjóð, men sjálvur landstingsformaðurin talaði tá at og segði, at føroyingar vóru partur av donsku tjóðini.

Seinastu røðu sína heldur Jóannes bóndi í Havn ólavsøkuaftan í 1946 fyri 1000 fólkum. Hon snýr seg um deyða Ólav kongs á Stiklastøðum í 1030. Hann staðfestir, at bardagin á Stiklastøðum kundi metast sum eitt borgarastríð, har norðmenn bardust ímóti norðmonnum. Ólavur, sum førdi annan flokkin, vildi samla Noreg til eitt frítt og frælst ríki. Hinir, hann bardist ímóti, vildu ráða í hvør sínun landsluti undir donskum kongi.

"Ólavur kongur fall, men í falli sínum vann hann Noreg. Knútur hin danski setti son sín Svein og móður hans at stýra Noregi. Tað torgaðu hesir ikki, teir kravdu nú at fáa norskan kong og settu Magnus Ólavsson í faðirs síns kongsstól. Noreg var afturvunnið undan fremmandavaldinum. Tá kom Noreg í blóma," staðfestir Jóannes bóndi í røðuni ólavsøkuaftan.

Hendan frásøgnin er ein mynd av, hvussu hann sær støðuna í Føroyum í 1946, tí beint eftir, at hann er liðugur at siga frá hendingunum í 1030, nevnir hann, at stríðið upp undir fólkaatkvøðuna eisini er at meta sum eitt borgarastríð. Landsins íbúgvar skulu nú taka tøkini og hava skilt seg í tveir flokkar. Annar berjist fyri at eiga landið, og hin vil, at danskarar skulu eiga tað. Halda tey fólkini fast um sína støðu, ið vilja geva Føroyar burtur, kunnu tey bara fara til Danmarkar og verða verandi har, tí Føroyar saknar tey ikki, sigur hann bersøgin at enda.

## Jóannes bóndi doyr

Hetta eru síðstu almennu orðini hjá Jóannesi Paturssyni. Kl. 01.00 tann 2. august í 1946 doyr hann í heimi sínum í Kirkjubø. Øll tey føroysku bløðini og nógv donsk og íslendsk bløð skriva um deyða hansara. Information skrivar, at hann "var gennem et par menneskealdre den symbolske fører for den færøske selvstændighedskamp. Han var mere folkefører og digter, end han var politiker," vil blaðið vera við. Haraftrat skrivar Information:

"Jóannes Patursson havde ikke altid været løsrivelsesmand. Han var tværtimod i sine unge dage betaget af Danmark og satte stor pris på Danmark. Hann skrev flere digte, hvori han tolkede denne kærlighed. Men Patursson var først og fremmest føring. Færingerne er et selvstændigt folk, og dette folk ejer retten til at råde over sine egne anliggender, det var udgangspunktet for hans politiske indstilling."

Dimmalætting skrivar, at "Jóannes Patursson havde et charmerende væsen, var en rutineret taler og agitator, var en habil digter og en særdeles produktiv skribent. Han ejede stor evne med små midler at vække national begejstring blandt såvel unge som ældre." Dimmalætting heldur, at bóndin møguliga ikki hevði so stóran áhuga fyri praktiskum politikki, og at politiska handalagið tí ikki altíð var tað besta.

Petur Mohr Dam skrivar minningarorð um bóndan í Føroya-Sosialdemokrati. "Á morgni 2. august sást í bý og bygd fløgg í hálvari stong. Ein hin navnframasti føroyski politikarin var farin. Jóannes bóndi var deyður yvir áttatiára gamal. Heilabløðing var honum at bana," skrivar hann. Petur Mohr Dam fagnar Jóannesi á mangan hátt, men heldur ikki, at bóndin orkaði av geva sjálvstýrispolitikkinum tann fastleika, sum treyta ein skjótan sigur fyri eina rørslu. At vekja samhuga í mongum málum eisini hjá javnaðarmonnum megnaði hann tó.

Í Dagblaðnum skrivar Thorstein Petersen 6. august, at Føroya mætasti maður síðan Nólsoyar Páll og Niels Winther er deyður. Thorstein Petersen slær fast, at bóndin var eitt stórmenni og vísir til eina samrøðu teirra millum, har Jóannes bóndi segði, at besta kvøld, hann hevði havt, var 2. jólakvøld í 1888, tá hann á tiltikna jólafundinum byrjaði sítt politiska starv við yrkingini "Málstrev." Thorstein Petersen staðfestir, at fremsta sessin í Føroya søgu frá 1888 til 1946 eigur Jóannes Patursson.

## Fall og vann

Jóannes Patursson varð jarðaður í Kirkjubø 6. august í 1946. Størri mannfjøld enn hon, sum fylgdi honum til seinasta hvíldarstaðin hendan týsdagin, hevði ikki fyrr verið í Kirkjubø, skrivar Tímin hósdagin 8. august. Prestur beyð bóndanum farvæl við somu orðum, sum Jóannes hevði borið Jákupi Dahl tvey ár frammanundan. Tímin endar frásøgn sína soleiðis: "Veðrið hevði hildið sær hendan dapra dag, men brast nú á við regni, tá ið móðir Føroyar hevði breitt lak á son sín."

Fimm vikur seinni skrivaðu donsk bløð, at meiriluti var fyri loysing á fólkaatkvøðuni 14. september, og at Knud Kristensen, forsætisráðharri, ásannaði, at Føroyar og Danmark máttu skiljast. Hvat var hent? Fall bóndin, men vann land sítt í fallinum eins og Ólavur kongur á sinni? Romantiskar útleggingar kunnu ivaleyst koma til hesa niðurstøðu, tó at mangt hendi síðan, sum framvegis verður stríðst um í føroyskum politikki, og sum meira kann lesast um í spennandi keldusavninum hjá Zakariasi Wang.